# SsangYong Actyon




*Action er nýggjasta modellið hjá SsangYong á føroyska marknaðinum*

**Actyon er nýggjasti bilurin frá suðurkoreansku SsangYong verksmiðjuni á føroyska marknaðinum. Talan er um ein væl koyrandi sportligan coupé við 5 hurðum og SUV eginleikum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Suðurkoreanska SsangYong verksmiðjan, ið hevur meira enn 50 ár á baki, byrjaði sína framleiðslu við arbeiðsbilum sum t.d. lastilum, bussum og øðrum sergjørdum akførum í 1954. Gjøgnum árini hevur verksmiðjan ment seg, og síðan fyrst í 90-unum hava teir samstarvað við týsku Mercedes-Benz, serliga um motorar og girkassar.

Nýggjasta modellið á føroyska marknaðinum er Actyon, ið faktiskt er ein sportligur coupé við SUV (Sport Utility Vehicle) eginleikum. Bilurin hevur við fimm sitipláss við liðiligari innrætting.

Kvaliteturin í kabinuni er týðuliga merktur av Mercedes-Benz samstarvinum. Designið er einfalt og smart, samstundis sum tað er í klassiskum stíli. Øll í bilinum sita høgt og væl við góðum útsýni.

Actyon er væl útgjørdur við til dømis ESP, ARP, HDC, klimaanleggi, hita í setrunum, radio við fløguspælara, 16" alu-felgum, el-síðuspeglum og el-síðurútum. Umframt hita í forrútinum. Dubult airbag og gardinairbag eru sjálvsøgd.

Motorurin er ein 2.0 litra common rail diesel við 141 hk og einum snúningsmomenti upp á 310 Nm við 1.800 snún/min. Sami motorur sum er í SsangYong Kyron.

Bilurin orkar væl, og uttan trupulleikar sleipar hann ein viðfestisvogn, sum vigar væl yvir tvey tons. Hetta er væl meira enn aðrir SUV í hesi støddini.

Actyon fæst bæði sum forhjólsdrivin og sum 4x4 í útgávunum Freedom ella Spirit.

Bilurin kann royndarkoyrast hjá Sp/f Bilverkstaðnum v/ H. J. Kollsker á Hjalla. Prísirnir byrja við 308.056 kr v/ mvg fyri persónbilin og 264.214 kr v/mvg fyri vørubilin.




*Actyon er ein sportligur coupé við SUV (Sport Utility Vehicle) eginleikum*

## FAKTA

### SsangYong Actyon 2.0 XDI 4x4

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,0 litur 4 syl. diesel 141 hk commonrail turbo v.intercooler |
| Snúningsmoment | 310 Nm v.1.800 snún/min. |
| 0-100 km/t | 14,2 sek. |
| Oljunnýtsla | 11,9 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 255/75-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 446.0 cm |
| Breidd | 188,0 cm |
| Hædd | 174,0 cm |
| Eginvekt | 1800 kg |
| Prísur | frá kr. 308.056 (persónbilur) |
| Søluumboð | Sp/f Bilverkstaðið v/ H. J. Kollsker á Hjalla, FO-188 Hoyvík Tel. 311013 www.kollsker.com |

*Kvaliteturin í kabinuni er týðuliga merktur av Mercedes-Benz samstarvinum*



**Ellisakfar til sølu**



**Volvo 144 sedan, árg. 1971.**
Bilurin varð høvuðsumvældur í 1994 og er í góðum standi. Bert tveir eigarar, einans koyrt 85.000 km.
**Tel. 282805**